# Loftar tú mær?

Rithøvundur og myndprýðari: Rakel Helmsdal (Føroyar)
Bókadeild Føroya Lærarafelags, 2019

Tilnevnd Barna- og ungdómsbókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins 2020

Søgugongd: Í søguni hitta vit trý systkin, sum hava mist langommuna. Lítlibeiggi, systir og stóribeiggi eru í garðinum. Vit eru við í tonkum og kenslum hjá børnunum um, hvussu deyðin ávirkar tey. Lítlibeiggi grætur ikki, men livir í løtuni. Systirin flýgur við dreka, og stóribeiggi, sum átti at ansað eftir sínum systkjum, syrgir og minnist langommuna.

Evni: sorg, deyði, kenslur, systkin




## Samtalur og virksemi:

### HYGG OG LES saman við teimum yngstu

**Hyggið at myndunum saman. Hvørjar áhugaverdar smálutir finna tit? Tosið um litir. Hyggið at trænum, finna tit eitt gamalt úthús úr træi? Hvørji djór finna tit?**

### TEY YNGRU

**1. Hyggið at kápumyndini. Hvat halda tit, bókin snýr seg um?**

**2. Hvørji munnu tey trý á kápumyndini vera?**

**3. Hvat gera tey?**

**4. Eigur tú systkin? Hvussu er at eiga systkin?**

### MIÐLINGAR

**1. Les bókina fyri børnunum tvær ferðir. Fyrstu ferð uttan at vísa teimum permuna ella myndirnar og seinnu ferð, meðan børnini síggja myndirnar. Tosið saman um lesiupplivingarnar.**

**2. Høvundurin hevur skapað figurar við tómum andlitum. Hvat heldur tú um tað? Hvat heldur tú, hon vil við tí?**

**3. Hugsa um huglagið í bókini. Hvat fær hon teg at hugsa um?**

**4. Systkini nevnast lítlibeiggi, systir og stóribeiggi. Hví heldur tú, at tey ikki hava nøvn?**

**5. Skriva eitt stutt bræv til onkran, sum tú hevur mist. Tað kann vera eitt húsdjór, onkur, sum er deyður, ella ein vinur ella vinkona, sum er flutt/ur.**

### TEY STØRRU BØRNINI

**1. Hvat dámdi tær við bókini? Hvat dámdi tær ikki? Var nakað, ið tóktist trupult? Kennir tú nakað aftur úr øðrum søgum?**

**2. Hví heldur tú, bókin eitur *Loftar tú mær*?**

**3. Systkini syrgja á ymiskan hátt. Tosið saman í bólkum um, hvussu sorg kennist.**

**4. Hyggið at tekstinum. Hvussu er teksturin settur upp? Finna tit nøkur mynstur?**

**5. Høvundurin nýtir ervafrásjón í myndum sínum. Hvat heldur tú, at hon vil vísa við hesum?**

**6. Hvat heldur tú krákurnar, hvíta dúgvan og gamla træið eru tekin um?**

**LES EISINI:**

*Vi är Lajon!* eftir Jens Mattsson og Jenny Lucander

MÁLBITIN

# "Sorg"

| svenskt | danskt | norskt | íslendskt | føroyskt | grønlendskt | finskt | norðursamiskt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Sorg | Sorg | Sorg | Sorg | Sorg | Aliasunneq | Suru | Moraš |



Frámerkið myndir av tykkara lesiupplivingum við #nordiskabokslukaren!